# Atlantic Airways skipar fyri ferðavinnuráðstevnu

**Hetta vikuskiftið vitja 30 fólk úr 9 ymiskum londum í Føroyum, felags fyri tey er, at tey øll til dagligt fáast við at selja Føroyar sum ferðavinnu land.**

FERÐAVINNA

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Fly Faroe 2006 - Travel Mart er heitið á ferðavinnu ráðstevnu, ið verður hildin í Føroyum hetta vikuskiftið. 30 fólk úr 9 tjóðum, ið øll dagligt fáast við at selja Føroyar sum ferðavinnu land, hittast til verkstaðir, og sokallaða networking. Hetta er fyrsta stevna av hesum slag, men sambært Kent Christensen hjá fyriskiparanum Atlantic Airways verður tiltakið afturvendandi í apríl mánað á hvørjum ári.

### Ein góð byrjan

Kent Christensen greiðir frá, at tey, ið eru boðin við, eru fólk í frammanundan selja ferðir til Føroyar. Hetta eru fólk úr londum sum Sveis, Fraklandi, Danmørk, Íslandi, Noregi, Svøríki, Bretlandi og Ísrael. Talið 30 er eitt vet lægri, enn Atlantic Airways hevði havt ætla, men hetta er ein góð byrjan, heldur Kent Christensen.

### Størri samband

Ætlanin við hesi ráðstevnu er fyrst og fremst at geva hesum fólkum betri innlit í føroyska samfelagið og føroysku ferðavinnuna. Men samstundis eisini at skapa netverk soleiðis, at tann, ið situr og selur føroyskar ferðavinnu upplivingar, fær eitt tættari samband við tann, ið veitir upplivingarnar. Hetta er sjálvandi við til, at gera hugin at selja upplivingarnar størri.

Frammanundan er ferðavinnu ráðstevnan Vestnorden Travel Mart, ið verður hildin í Føroyum 4. hvørt ár. Men hetta er ein nógv størri ráðstevna har øll Norður Lond eru evnisøkið. Fly Faroe skal ikki síggjast, sum ein kappingarneyti ella avloysari til Vestnorden Travel Mart, men heldur sum eitt alternativ, sigur Kent Christensen.

### Skapa netverk

Vikuskiftið verður skipa við nógvum faklingum arbeiði, men eisini við hugna og upplivingum. Leygarmorgunin halda umboð fyri ferðaráðið og stjórin hjá Atlantic Airways Magni Arge fyrilestrar fyri gestunum. Fyrilestrar, ið skulu betra um kunnleikan hjá sølufólkunum um vøruna, ið tey selja.

Seinnapartin verður skipað fyri verkstøðum, har nógv ymisk fólk úr føroysku ferðavinnuni luttaka. Hetta kann gerast sera gevandi fyri bæði gestir og føroysku ferðavinnuna, ið kann fáa íblástur, um hvørji øki kundin vil hava ment.

Men umframt fakliga arbeiðið verður eisini skipað fyri fleiri tiltøkum, ið hava til endamáls at styrkja sambondini millum føroysku ferðavinnuna og útlendsku sølufólkini. Eitt nú ein stór galla veitsla í Müllers Pakkhúsi.

Kent greiður frá, at hjá Atlantic Airways vónar man, at hetta kann vera við til at skapa eina elitu av seljarum, ið hava áhuga í og kunnleika um Føroyar. Tí sovorðin netverk eru mest týdningarmikli parturin, tá tað snýr seg um at selja Føroyar sum ferðavinnuland.




*Kent Christensen, marknaðarstjóri hjá Atlantsflog*

# Rúmligi arbeiðsmarknaðurin á dagsskránni

**50 ára dagurin hjá ALV hevur í dag verið hildin við stórari ráðstevnu á Hotel Føroyum, har danskur vinnustjóri og stjórin fyri Munin fyrrapartin høvdu áhugaverdar fyrilestrar og persónar greiddu frá, hvussu ALV hevur verið við til at fáa teimum atgongd til arbeiðsmarknaðin**

ALV 50 ÁR

*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Páskadag var hálv øld liðin síðani at ALV sá dagsins ljós. Dagurin hevur verið hildin á Hotel Føroyum í dag. Knappliga tvey hundrað fólk hava verið á ráðstevnu. Evnið var Rúmligur arbeiðsmarknaður. Evnið hevur verið lýst í fyrilestrum, framsýningum og orðaskifti.

Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almannamálum, setti stevnuna, eftir at Kristina Larsen, sum er dagligur leiðari, hevði bjóðað vælkomin. Hans Pauli leit aftur á farnu hálvu øldina og nevndi eldsálirnar, sum fóru undir stóra takið at fáa tey, sum høvdu verið fyri skerdum luti, á arbeiðsmarknaðin. Ikki minst nevndi hann Karolinu Petersen, sum nógv tey flestu árini hevur verið leiðari í ALV, væl stuðlað av manni sínum, Peturi Petersen. Tey vóru prestahjún í Hvalvík, tá ið virksemið hjá ALV var við Áir.

Poul Knudsgård, sum er stjóri á Reys, sum ger brenniovnar í Frederikshavn, hevði fyrrapartin ógvuliga áhugaverdan fyrilestur um, hvussu Reys arbeiðir við at slúsa tey, sum ikki fingu bestu korini, inn í arbeiðspláss.

- Tað ræður um at vera ordulig fólk og at vera ordulig fyritøka. Vit royna at hava áhuga í teimum, sum arbeiða hjá okkum og at vísa atlit og fyrilit. Men vit koma ikki uttan um, at tað fyrst og fremst ræður um at tjena pengar. Ein fyritøka, sum ikki tjenar pengar, verður ikki leingi ein fyritøka. Takið er at tjena pengar og samstundis at vísa sosialt atlit. Tað hava vit havt góðar royndir við, segði Poul Knudsgård, sum greiddi frá dømum um, hvussu tey hava fingið fólk at rigga á arbeiðsmarknaðinum.




*Johann Samuelsen er formaður í styrinum fyri ALV* *Mynd: Jens Kristian Vang*

Eisini umrøddi hann, hvussu stóran týdning fyritøkan leggur á, at tey, sum fyritøkan samskiftir við - eitt nú fyritøkur í Eystureuropa og Kina - hava somu fatan og somu tilvitan, sum politikkurin hjá Reys hevur. Eftir tað greiddu trý fólk við royndum innan ALV útbhúgving frá. Tey vóru Elsa Maria Wolles og Mads Brisenfeldt, sum arbeiða ávikavíst á Prentmiðstøðini og hjá FORMULA, Anfinn Hansson, stjóri í Føroya Gasssølu og Jan Højgaard, sum er farin víðari í hægri handilsskúla.

Kenslan av, at hetta bara er nakað, sum tey gera í útlandinum og ikki í Føroyum, varð gjørd til einkis, tá ið Bogi Jacobsen frá Munin greiddi frá royndunum, sum fyritøkan hjá honum hevur av at vera við til at víðka føroyska arbeiðsmarknaðin.

Jóannes Ejdesgaard, løgmaður, røddi um døgurðatíð um Visión 2015 og rúmliga arbeiðsmarknaðin, og seinnapartin var panelfundur, har landsstýrismenninir Bjarni Djurholm, Jógvan á Lakjuni, Hans Pauli Strøm, Rósa Samuelsen, Georg Hansen, Leila Solmunde og Jan Mortensen luttóku. Jógvan Fríðriksson, prestur, tók saman um, og Jóhan Samuelsen, handaði at enda stovnarunum gávu.